## DAGSINS MEINING

# Nú nærkast

Eftir sera stóru vónirnar til at finna olju á landgrunninum fyri umleið fimm árum síðani eru bæði føroyingar og oljufeløg vorðin meira realitisk. Hugtakið at vera "varisliga bjartskygd" er komið inn í oljumálið og er tað eisini gott. Umleið 10 ár eru farin, síðani vit av álvara fóru at fyrireika oljuleiting við Føroyar. Í oljuhøpi er tað ikki nøkur long tíð. Men stórar íløgur eru uppá spæl og til ber heldur ikki at bíða út í tað endaliga. Okkurt positivt skal henda, um oljufeløgini framhaldandi skulu vera verandi her og gera íløgur.

Tað var so júst tað, sum hendi í fjør, tá nøkur av stóru oljufeløgunum í heiminum, ChevronTexaco og Statoil, gjørdu eitt stórt fund beint við markið. Tað líkasum hevði katalysatoreffekt við sær soleiðis, at fleiri feløg bráddliga vístu 2. útbjóðing á okkara landgrunni áhuga. Um hetta fundið ikki varð gjørt, tó at tað liggur á bretskum øki, so er ikki vist, um nakar áhugi hevði verið fyri nýggju útbjóðingini. Men har vóru vit so heppin. Fundið skamt frá markinum birti lív í aftur vónirnar, at olja finst við Føroyar. Og nú sleppa hesar vónir so at standa sína roynd. Tí um gott og væl eitt hálvt ár verður borurin eftir øllum at døma settur í undirgrundina aftur. Og tað eru ikki hissini brunnar, sum skulu borast. Hesir eru so mikið kostnaðarmiklir, at talan helst verður um at leggja fýra brunnar saman til tveir.

Stórur partur av undirgrundini er fjaldur av tjúkkum basaltfláum. Torført er at síggja gjøgnum basaltið og gera av, hvar tað er best at leita. Men eftir stórt kanningarbeiði halda oljufeløgini seg nú síggja nakað undir basaltinum, sum kann vera stórar oljukeldur. Og tað eru hesar, sum feløgini næsta summar og møguliga eisini í 2007 fara at bora niður til.

Her kann vera talan um "knald eller fald". Verður olja funnin undir basaltinum kann tað skapa ovurstóran áhuga aftur fyri undirgrundini. Verður eingin olja funnin har, so kann tað hava við sær, at allur áhugi fer at kølna fyri ikki at siga steðga upp. Hóast tol krevst og hóast nógvir brunnar kunnu verða boraðir, áðrenn rakt verður við rakstrarverdug fund, so má tó sigast, at brunnarnir á basaltinum í komandi árum fara at fáa avgerandi týdning fyri, hvussu nær ella fjart eitt føroyskt oljuævintýr er. Men sær "svart" út inni á basaltinum, so er tó heldur ikki orsøk til at missa alla vón vón. Tí úti við markið eru so eisini møguleikar. Fundið hinumegin á bretskum øki, sum fekk glið á aftur á Atlantsmótinum liggur so tætt upp at føroyskum øki og kann vera so mikið stórt, at tað fer at "smitta" av uppá loyvini okkaru megin. At feløgini vilja arbeiða báðumegin markið. Sum støðan sær út í løtuni, so vendir tað rætta vegin. Árini 2006 og 07 kunnu gerast týðandi aldarmót fyri føroyska samfelagið bæði so ella so.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjúkrahússjúka og reingerð

**A. Guttormur Djurhuus**



At eitt prus kann taka ilt fyri seg vita vit øll. Vit vita eisini øll at eitt sár hevur bestu møguleikar at lekjast, um tað verður hildið reint. Um umhvørvið er lívsørt, er eingin vandi fyri smittu uttanífrá og møguleikarnir fyri grøðing teir bestu.Tað varð einaferð hildið, at vandin fyri smittu var av ongum ella lítlum týdningi. Tók ilt fyri seg kundi brunin lættliga berjast niður við antibiotika. Men sum árini liðu gjørdist fleiri og fleiri bakteriur mótstøðuførar móti antibiotika. Tær gjørdist resistentar. Ikki bert resistentar, men multiresistentar. Tað merkir at tær gjrødust resistentar ímóti fleiri ymiskum sløgum av antibiotika.

Í dag eru trupulleikarnir stórir av smittu, sum stendst av multiresistentum bakterium. Serliga eru trupulleikarnir stórir á sjúkrahúsum, og hevur trupulleikin tískil fingið navnið sjúkrahúsjúkan, hóast tað ikki er nøkur sjúka. Besta amboðið at berja niður vandan fyri smittu av multiresistentum bakterium er reinføri.

At reinføri fyribyrgir smittu, vísti ungarin Ignaz Semmelveis longu í 1843. Føðideildin á sjúkrahúsinum í Wien, har hann arbeiddi, var býtt sundur í tvey. Á aðrari deildini starvaðust ljósmøður og á hinari læknakandidatar. Á ljósmøðursíuni var deyðstíttleikin áleið 3 %, men á læknasíðuni millum 10 og 30 %. Semmelveis legði til merkis at læknakandidatarnir kundu fara frá líkskuri til føðihjálp, uttan at vaska hendurnar. Aftaná kravboð um at hendurnar skuldu vaskast í klorvatni aftaná líkskur og tá farið varð frá einari barnakonu til aðra, fall deyðstíttleikin niður á 1,3 %. Sum ikki eina ferð noktaði akademiska verðin at boyggja seg fyri veruleikanum og varð Semmelweis rikin úr Wien og heim aftur til Ungarn. Har gjørdist hann tó professari og fekk trýst ígjøgnum at føðideildirnar vórðu reformeraðar.

Eitt gjøgnumført reinføri, frá umhvørvi til sjúkling, hevur víst seg at vera besta fyribyrgingin móti sjúkrahússjúku. Og her hava vaskikonurnar, menn eru helst ónýtiligir til hetta krevjandi arbeið, týdningarmiklan leiklut. Skúribust, soda, klorvatn og grønsápa, saman við dugnaligum vaskikonum, hevur víst seg at vera besta amboðið móti hesu herviligu ígerð.

Meg minnist eina ferð, tá eg sum ungur maður arbeiddi á eini kanningarstovu, ið royndi at menna nýggjan heilivág, at nú kuldi sparast. Og sjálvandi skuldi sparast frá í neðra av. Vaskikonurnar skuldu skerjast. Tá reistist kanningarstjórin Bo Lam, sum seinni gjørdist professari, og segði at um skerjast skuldi átti tað at vera frá toppinum av og ikki frá í neðra av. Lutvís gingu fleiri vaskikonur í løn ímóti einum akademikara og lutvís vóru dugnaligar vaskikonur ringari at fáa fatur á enn dugnaligum akademikarum. Tær fann tú ikki undir hvørjum steini! Og so varð.

Tá sparast skal á Landssjúkrahúsinum er tað altíð í niðara enda at skorið verður. Tað er teimum lægst løntu at farið verður eftir. Næstu ferð skert verður, roynið tá at skera av í ovara enda. Koyrið nakrar stjórar heim og kanska nakrar yvirlæknar við teimum. Tað munar nógv betur og nervar ikki sjúklingarnar. Ikki er lang síðani at einsamallur dani stjórnaði øllum sjúkrahúsinum uttan stórvegis trupuleikar, so óneyðugt skuldi veri við einum riðili av stjórum.

# Er bólkur 1 (Lemmatrolarar) skjótt søga eisini?

**Mikkjal Hammer**
*850 Hvalba*

Eftir at hava fingið fiskiloyvini fyri næsta hálva árið, har aftur ein stórur niðurskurður er í hjáveiðukvotuni, situr man spyrjandi um ætlanin nú er at avreiða bólk 1 sama veg sum rækjuskipini.

Hjáveiðukvotan hjá bólki 1 er atgongumerkið til innaru leið. T.v.s. at fyri at kunna fiska upsa og annað á innaru leið, er neyðugt at kunna fiska tosk og hýsu. Henda kvota var upprunaliga 100 tons av ávikavist toski og hýsu fyri hvørt hálvárið. Men eftir at hava móttikið fiskiloyvini fyri næsta hálva árið, staðfesta vit at hon nú bert er 40 tons. Og tá okkara niðurskurður nú í tveimum førum er nógv størri enn hjá øðrum líknandi skipabólkum, so er spurningurin, hvat vil Fiskimálaráðið við bólki 1. Hesin niðurskurður er kanska bara promilllu av heildarveiðuni, men fyri bólk 1 er hesin niðurskurður ein stórur partur av hjáveiðukvotuni

Teir flestu lemmatrolararnir eru heimahoyrandi í Suðuroynni, men vónandi er avstandurin ikki so stórur suður, at landsstýrismaðurin ikki veit, hvat fylgir hetta kann fáa fyri hesi skip og Suðuroynna.

Fyri okkum sum varða av hesum skipum er hettar sera ørkymlandi. Hettar kemur beint eftir at landsstýrismaðurin hevur sett kunngerðir í gildi (fiskapakkan), sum ger at vit ikki í sama mun sum áður, kunnu hava ein fíggjarliga skilagóðan rakstur.

Og sum er, er raksturin sera tungur, serliga av høga oljuprísinum, og við framhaldandi minkandi rættindum, gongur skjótt skeiva vegin.

Vónandi var hettar ein kiksari hjá landstýrismanninum, soleiðis at vit aftur fáa somu hjáveiðukvotu, sum vit høvdu áður, í øllum føri ikki størri niðurskurð enn aðrir í prosentum. Um ikki, so fari eg at heita á landstýrismannin um greitt at boða frá, at hettar verður politikkurin mótvegis lemmatrolarunum, soleiðis at vit kunnu taka neyðug stig fyri at minimera tapi hjá partaeigarum og øðrum ognarum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.